**Kvæðatilfar - Nr: 16**

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** Allir flokkar

**Uppgávuslag / heiti:** Teknirøð

**Vegleiðing:**

Lærarin greiðir frá gongdini í kvæðnum, soleiðis at næmingarnir fáa eina fatan av, hvat kvæði snýr seg um.

Í sambandi við persónslýsingarnar eiga hesir at fáa nøkur sereyðkenni, soleiðis at persónarnir eru at kenna aftur, hóast næmingarnir tekna á ymiskan hátt. Brestir kann t.d. hava stórt skegg, meðan Beinir bert hevur yviskegg, Sigmundur kann vera i grønum klæðum og hava gult hár, meðan Tórir er í brúnum og hevur svart hár.

Síðani fáa næmingarnir eitt ark í part og tekna tvær myndir hvør. Lærarin góðkennir ella rættleiðir hvønn næming sær, soleiðis at allar myndirnar at enda eru góðtiknar.

Hesar verða so avritaðar, soleiðis at hvør næmingur fær eitt fullfíggjað eintak.

Eisini ber til at arbeiða víðari við uppgávuni eftir ymiskum leistum. Sí niðanfyri.

**Onnur hugskot:**

Ein møguleiki er at lata næmingarnar bæði tekna myndirnar og skriva ein tekst við vanligum máli til myndina.

Eitt annað hugskot er at skilja tekst og myndir at og blanda tað. Nú kunnu næmingarnir royna at seta tekst og myndir rætt saman aftur.

Uppsetingin kann nýtast til onnur kvæði eisini. Tá er mannagongdin henda: Set eina tabell inn í eitt Word programm. Tabellin skal hava eina kolonnu og tvífalt so nógv røð, sum kvæðið hevur ørindi.

Avrita kvæðaørindini inn í annað hvørt rað og snøgga at enda tómu røðini til, soleiðis at tey kunnu nýtast til frágreiðandi myndir.